Álit

í

løgtingsmáli nr. 55/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Grønar hitaloysnir, talgildir fjølmiðlar og talgild avgjaldsuppgerð)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 6. desember 2023, og eftir 1. viðgerð 12. desember 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 24. januar og 1. og 8. februar 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Vinnuhúsið, felags umboð fyri fyritøkurnar Krosstein, Maria Poulsen, Demich og Zacharias Leitisstein, í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, saman við Umhvørvisstovuni og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, aðru ferðina saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu, Hanna Jensen og Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um tríggjar ymiskar broytingar í meirvirðisgjaldslógini.

Ein broyting er at leingja skipanina við mvg-endurgjaldi fyri uppsetan av hitapumpu til fult endurgjald í 2024, og síðani so líðandi at niðurlaða skipanina til hon við endanum av 2027 er avtikin. Sum nakað nýtt verður ein treyt fyri at fáa mvg endurgoldið, at hevur umsøkjarin áður brúkt oljufýringarútbúnað til upphiting, skal hann viðleggja móttøkuváttan frá IRF/KOB um burturbeining av hesum útbúnaði.

Ein onnur broyting er at javnseta talgildar tíðindamiðlar við tíðindabløð viðvíkjandi mvg frítøku.

Ein triðja broyting snýr seg um at krevja talgilda innlating av mvg-uppgerðum.

Hitapumpur
Undir hoyringunum er m.a. komið fram, at tað kanska hevði tænt endamálinum við at orkunýtslan á landi skal verða 100% grøn í 2030, at skipanin við mvg-afturbering fyri grønar hitaskipanir var galdandi til 2030, og at útfasingin var meira líðandi enn í dag. Tað hevur tikið tíð hjá vinnuni at koma á hædd við økta eftirspurningin, og tá ið tað er talan um nýbyggjarí tekur tað rúma tíð frá byrjað verður, og til húsini standa liðug.

Tað hevur eisini verið víst á, at tað kann taka óneyðuga tíð at fáa móttøkuváttan frá IRF/KOB, og at tað tí kundi verið meira ómakaleyst fyri kundan, um tann, ið setti hitapumpuna upp, eisini kundi

váttað fyri burturbeining av oljufýring. Nevndin hevur tó fingið upplýst, at hetta ikki neyðturviliga er so, tí at tað er í sama oyðublað, veitarin váttar fyri hitapumpuna og IRF/KOB váttar fyri burturbeining av oljufýring. IRF heintar oljufýringina, men brúkarin má sjálvur fáa hana burturbeinda í økinum hjá KOB. Tað er onki í vegin fyri, at veitarin, ið ofta burturbeinir oljufýringarnar, kann fáa váttanina frá brennistøðini.

Ein annar spurningur, ið hevur verið viðgjørdur, er, hví oljufýringin skal burturbeinast, um hon er lutfalsliga nýggj. Ynskið hjá Umhvørvismálaráðnum er, samsvarandi veðurlagspolitikkinum, at vit skulu burtur frá oljuni, og tá viðvíkur upphiting, eru góð alternativ longu tøk á marknaðinum.

Í sambandi við mvg-afturberingina er ásett eitt mark fyri elarbeiðið uppá kr. 7.000, meðan tað onki mark er á fyri restina av arbeiðinum; hetta er gjørt fyri at tryggja, at tað bert er elarbeiðið í samband við hitapumpuna, ið afturbering fæst fyri, og ikki ymiskt annað. Nevndin hevur fingið upplýst frá Umhvørvisstovuni, at rokningar fyri el-innlegging vísa, at kr. 7.000 framvegis er ein hóskandi upphædd. Meirilutin metir, at tað hevur týdning av og á at meta um, hvørt hetta hámark framvegis er ein hóskandi upphædd.

Viðvíkjandi bíðitíðini at fáa endurgoldið mvg hevur nevndin fingið upplýst, at tað er Umhvørvisstovan, ið viðger umsóknirnar, og at sera nógvar umsóknir eru bæði til hesa skipanina og til skipanina við stuðli at taka oljufýring niður, og at hetta er tíðarkrevjandi. Tá ið umsóknin er liðugt viðgjørd, tekur tað eina viku hjá TAKS at avgreiða afturberingina.

Talgildir tíðindamiðlar og tíðindabløð.
Fyri at gera kappingina millum analogu og talgildu tíðindamiðlarnar javnari, verða hesir miðlar við uppskotinum javnsettir í meirvirðigjaldshøpi.

Talgild innlating av mvg-uppgerð
Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið vóru 4.805 mvg-uppgerðir, ið áttu at verða innlatnar 2. ársfjórðing 2023. Av hesum vórðu 4.221 innlatnar talgilt og 323 manuelt. Hetta svarar til, at av samlaða talinum vórðu 88% innlatnar talgilt og 7% manuelt.

Viðvíkjandi møguligum trupulleikum hjá smærri virkjum at lata mvg-uppgerðina inn talgilt, hevur nevndin havt Vinnuhúsið til hoyringar. Vinnuhúsið, eins og grannskoðararnir, kennir ikki til trupulleikan.

Meirilutin heldur, at hóast tað bara eru 7% av innlatingunum, ið ikki verða latnar inn talgilt, so er tað í tali talan um rættiliga nógvar fyritøkur, 323, ið lata inn manuelt.

Fyri at fáa hetta útgreinað nærri, hevur nevndin reist spurningin við TAKS, og upplýst er, at hesi lata inn á fleiri ymiskar hættir, onkur við telduposti og onkur við brævi. Fyri at lata inn manuelt er neyðugt at fara inn á skipanina og prenta skjølini út haðani. Skipanin riggar sum ein skipan við síðuna av, og tey, ið lata inn á henda hátt, rinda eitt ómaksgjald. Upplýst er eisini, at talið er minkað spakuliga seinnu árini, men at tað, at fáa omanfyri 300 mvg-uppgerðir inn manuelt fýra ferðir um árið, krevur arbeiðsorku.

TAKS metir ikki, at tað er nakað í vegin fyri, at tað verður ásett sum eitt krav, at mvg-uppgerðin verður latin inn um talgildu sjálvgreiðsluna hjá stovninum. Atgongd til Vinnugluggan krevur, at tann

vinnurekandi hevur atgongd til Samleikan og Vangan, og henda atgongd er ókeypis, samstundis sum tað slepst undan ómaksgjøldum frá TAKS fyri avgreiðsluna.

Meirilutin tekur tí sum útgangsstøði undir við, at hesar broytingar verða gjørdar.

Uppskot til broytingaruppskot frá landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum
Fíggjarmálaráðið hevur gjørt vart við, at lógaruppskotið ikki nóg greitt nágreinar, hvat talgild innlating av mvg-uppgerðum merkir, tí at talgilt kann merkja so mangt. Fyri at nágreina hetta á eintýðugan hátt, hevur Fíggjarmálaráðið mælt nevndini til eina broyting í lógaruppskotinum. Í sambandi við viðgerðina av uppskotinum til broytingaruppskot frá Fíggjarmálaráðnum komu tó eisini onnur ivamál fram hesum viðvíkjandi, eitt nú um heimildina at revsa við bót sbrt. § 33, stk. 1, litra b, sum við uppskotnu broytingini av § 20, stk. 1 fer at fevna um tey, ið ikki lata mvg-uppgerðina inn talgilt/umvegis Vinnugluggan.

Tí er meirilutin komin til ta niðurstøðu, at rættast er at taka partin um talgilda innlating heilt burturúr uppskotinum, soleiðis at tað ikki verður gjørd nøkur broyting har í hesum umfari.

Ístaðin heldur meirilutin, at upprunauppskotið og uppskotið til broytingaruppskot eiga at verða samansjóðað, fyri síðani at kunna verða løgd fyri Løgtingið saman við øðrum møguligum broytingum í meirvirðisgjaldslógini seinni í ár.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis: "(Grønar hitaloysnir og talgildir fjølmiðlar)"
2. § 1, nr. 6 verður strikað.
3. Í § 2, stk. 3 verður "nr. 5 og 6 hava" broytt til: "nr. 5 hevur".

Viðmerkingar:
Til nr. 1:
Talan er um fylgibroyting til broyting nr. 2, har "talgild avgjaldsuppgerð " verður tikið úr frágreiðandi heitinum.

Til nr. 2:
Við hesum verður broyting nr. 6 í lógaruppskotinum, ið snýr seg um at krevja talgilda innlating av mvg-uppgerðum, tikin úr lógaruppskotinum.

Til nr. 3:
Talan er um fylgibroyting til broyting nr. 2.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein minniluti (Beinir Johannesen) og **ein annar minniluti (**Steffan Klein Poulsen) hava hvør sítt broytingaruppskot, men hesar felags viðmerkingar:

Tikið verður undir við, at talgildir fjølmiðlar eisini verða frítiknir fyri mvg, eins og teir fjølmiðlar, sum bera tíðindi við bløðum. Hetta ger, at allir fjølmiðlar verða javnsettir, og kemur annars væl við hjá einari samfelagskritiskari vinnu, sum siglir í tungum sjógvi.

Viðvíkjandi broytingini um at lata mvg-uppgerðina inn talgilt, eru minnilutarnir samdir við teimum sjónarmiðum, sum meirilutin ber fram. Tað hava stungið seg nakrar óvissur upp í sambandi við nevndarviðgerðina av uppskotinum til broytingaruppskot, sum Fíggjarmálaráðið hevur borið Fíggjarnevndini.

Minnilutarnir taka tó ikki undir við broytingini um at leingja mvg-afturberingina til grønar hitaloysnir.

Undir viðgerðini av grønum stuðulsskipanum í Fíggjarnevndini er áður komið fram, at stórar upphæddir fara úr landskassanum og til teir borgarar, sum eru væl fyri og hava ráð til at gera dýru íløgurnar í grøna orku.

Tær grønu stuðulsskipanirnar venda tí sosialt skeivt.

Rættast hevði verið at latið tøknina og marknaðarkreftirnar borið okkum fram á grønu leiðini, heldur enn at brúka so stórar upphæddir uppá slíkan stuðul.

Harumframt er Fíggjarnevndin eisini áður upplýst um, at hvørki Umhvørvisstovan ella TAKS hava automatiskar skipanir til at viðgera nógvu umsóknirnar um grønan stuðul. Tær verða gjøgnumgingnar manuelt, ein og ein. Hetta fer tí við nógvari tíð og orku hjá stovnunum báðum, sum kundi verið brúkt betur.

Galdandi mvg-frítøkuskipan fyri hitapumpur hevur gildi fram til og við 2025. Átak 13 í samtykta veðurlagspolitikkinum ljóðar soleiðis: "*MVG frítøka til góðkendar hitapumpur: Verandi frítøkuskipan heldur fram til 2025 tá skipanin verður endurskoðað*" (lm. 130/2021). Tað er tí ikki ímóti samtykta veðurlagspolitikkinum at lata galdandi lóg standa óbroytta og harvið lata frítøkuskipanina ganga út aftaná 2025.

Yvirskipað hevur grøni politikkurin við sær, at hundraðtals milliónir verða tiknar inn við aðrari hondini og síðani givnar út aftur við hinari. Also pískurin verður hildin í aðrari hondini og gularótin í hinari.

Í sambandi við skattaumskipanina, sum bleiv samtykt fyri jól, blivu grønu avgjøldini (pískurin) økt við 120 mió. kr.; hækkað brennioljugjald, økt punktgjald á bensin og diesel og avgjald á innflutning av f-gassi. 120 mió. kr. sum vinnan og borgarar á øllum samfelagsløgum eru noydd at rinda.

Samstundis eru hundraðtals milliónir farnar úr landskassanum við grønum stuðulsskipanum (gularøturnar). Um hugt verður at, hvat hesar stuðulsskipanir hava kostað frá 2017 til 2023, so bleiv staðfest í svari til § 52a fyrispurning fyri jól (52-052/2023) um kostnaðin av grønum stuðulsskipanum, at elbilarnir hava kostað góðar 96 mió. kr. í MVG afturbering. Harafturat kemur skrásetingargjaldið. Í svarinum til fyrispurningin bleiv upplýst, at fyri hvønn keyptan elbil var mista inntøkan í skrásetingargjaldi eitt stað ímillum 60 og 100 tús. kr. Taka vit miðaltalið av hesum, 80 tús. kr., og

falda tað við talið av seldum elbilum hetta tíðarskeiðið, sum sambært heimasíðu Akstovunnar er 1.704, so er mista inntøkan í skrásetingargjøldum góðar 136 mió. kr. Tað vil siga, at stuðulin til elbilar tilsamans hevur kostað landskassanum umleið 232 mió. kr.

Í sambandi við sama fyrispurning varð eisini upplýst, at góðar 56 mió. kr. eru afturbornar fyri MVG í samband við keyp av hitapumpum, og í eykajáttanaruppskotinum fyri november 2023 (lm. 50/2023) sást, at neyðugt var við játtan í fjør uppá tilsamans 3,6 mió. kr. til at stuðla niðurtøku av "gomlum" oljufýringum.

Staðfestast kann tí, at grøni stuðulin hevur kostað landskassanum umleið 292 mió. kr. samanlagt. Afturat hesum hevur Fíggjarmálaráðið í svari til áðurnevnda fyrispurning mett, at grøni mvg-stuðulin til elbilar og hitapumpur kann fara at kosta landskassanum einar 50 mió. kr. í mistum inntøkum í 2024. Tá eru vit samanlagt komin uppá 342 mió. kr., og tá er rakstrarstuðulin, sum elbilar fáa við lægri vegskatti, ikki eingang tikin við.

Broytingarnar í uppskotinum hjá landsstýriskvinnuni seta eisini sum nýggja treyt, at hevur tú áður brúkt oljufýringarútbúnað til upphiting, so skal hesin útbúnaður burturbeinast fyri at fáa mvg-afturbering fyri grønu hitaloysnina. Tað merkir so, at eisini góðar oljufýringar verða beindar burtur, hóast tær kundu verið nýttar aftur. Minnilutarnir meta tað ikki vera góðan umhvørvispolitikk, at góður útbúnaður verður burturbeindur soleiðis, heldur enn at lata tað vera møguligt at endurnýta hann.

Samanumtikið kann staðfestast, at nógvar hundraðtals milliónir eru og verða brúktar uppá grøna politikkin. Í stóran mun eru hesar hundraðtals milliónirnar fluttar frá vanliga arbeiðsfólkinum og vinnuni til teir borgarar, sum hava ráð at gera grønu íløgurnar. Hetta er vánaligur sosialpolitikkur.

Frítøkurnar blivu upprunaliga gjørdar fyri at fáa ferð á grøna orkuskiftið. Minnilutarnir eru av tí áskoðan, at stuðulsupphæddirnar, ið eru nevndar, prógva, at tað hevur eydnast. Minnilutarnir halda tí, at vit eru komin hartil, at grøna orkuskiftið kann verða framt, uttan at stuðlað verður við so stórum upphæddum.

Annar minnilutin (Beinir Johannesen) metir, at av ymsum orsøkum er rætt eisini at veita fult endurgjald í 2024. Eitt nú steðgaðu kommunurnar allari jarðhitaboring í 2023, ið elvdi til fleiri seinkingar. Hetta hevur havt við sær, at fólk eru sett í bíðistøðu at fáa gjørt hesa íløgu. Bíðistøðan hevur gjørt, at fólk hava bundið seg til eina íløgu, men eisini, at fortreytirnar broytast, og tí kunnu fólk koma illa fyri av hesum. Hetta verður ikki hildið at vera rætt, tað at borgarar skulu koma fíggjarliga illa fyri av politiskum avgerðum. Tí burdi man eisini í 2024 afturgoldið fult meirvirðisgjald heldur enn hálvt. Fyri 2025 eigur man tó at halda fast í verandi lóggávu.

Hesin minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis: “(Grønar hitaloysnir og talgildir fjølmiðlar)”
2. Í § 1 nr. 1 verða í § 3 d, stk. 1 3. og 4. pkt. strikað, og í staðin verður sett:
   “Í 2025 verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldin. Í 2026 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið.”

3. § 1, nr. 2, 3, 4 og 6 verða strikað.
   Nr. 5 verður eftir hetta nr. 2.
4. Í § 2, stk. 2 verður "nr. 1-4 hava" broytt til: "nr. 1 hevur".
5. Í § 2, stk. 3 verður "nr. 5 og 6 hava" broytt til: "nr. 2 hevur".
6. § 3 verður strikað.

Viðmerkingar:
Til nr. 1:
Talan er um fylgibroyting til broyting nr. 3 omanfyri, har "talgild avgjaldsuppgerð " verður tikið úr frágreiðandi heitinum.

Til nr. 2:
Við hesi broyting verður skipanin tann sama fyri 2024, sum hon eftir galdandi lóg var fyri 2023, nevniliga at full afturbering fæst. Eins og eftir galdandi lóg verður í 2025 helvtin afturborin og í 2026 og fylgjandi ár eingin afturbering.

Til nr. 3:
Við at strika § 1, nr. 2 í lógaruppskotinum verður kravið um váttan fyri burturbeining av oljufýringarútbúnaði slept. Strikingin av § 1, nr. 3 og 4 er fylgibroyting til broyting nr. 2 omanfyri.
Við strikingini av § 1, nr. 6 í lógaruppskotinum verður lógarbroytingin viðvíkjandi talgildari innlating av mvg-uppgerð tikin úr uppskotinum.

Til nr. 4, 5 og 6:
Talan er um fylgibroytingar til broyting nr. 3 omanfyri.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Hin minnilutin (Steffan Klein Poulsen) heldur ikki, at afturberingarskipanin til hitapumpur skal leingjast. Galdandi afturberingarskipan er til og við 2025. Hetta er í samsvari við veðurlagspolitikkin og er ríkiliga long gildistíð. Tað má takast hædd fyri sera høgu útreiðslunum av grønu stuðulsskipanunum, og tí er alneyðugt at fasa skipanirnar út eftir galdandi lóg.

Hesin minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis: "(Talgildir fjølmiðlar)"
2. § 1, nr. 1, 2, 3, 4 og 6 verða strikað.
   Nr. 5 verður eftir hetta nr. 1.
3. § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. ársfjórðingi 2024."

4. § 3 verður strikað.

Viðmerking:
Til nr. 1:
Talan er um fylgibroyting til broyting nr. 2 omanfyri, har “grønar hitaloysnir” og “talgild avgjaldsuppgerð “ verða tikin úr frágreiðandi heitinum.

Til nr. 2:
Við hesi broyting verður tann parturin, sum snýr seg um grønar hitaloysnir og talgilda avgjaldsuppgerð, tikin úr lógaruppskotinum. Lógarbroytingin, ið hildið verður fast um í óbroyttum líki, er tann, ið snýr seg um at javnseta talgildar tíðindamiðlar við teir analogu í meirvirðisgjaldshøpi.

Til nr. 3 og 4:
Talan er um fylgibroyting til broyting nr. 2 omanfyri.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 20. februar 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	